Í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein

# Gevur upp eftir 29 ár



64 ára gamli Vagn Kvist hevur nú givið upp at verða valdur í danska fólkatingið. Seinastu 29 árini hevur Vagn verið valevni hjá Radikala Vinstra í Norðurjútlandi, men hann hevur ongantíð verið valdur.

- Eg verði 65 ár í summar, so tíðin er komin at gevast, sigur Vagn Kvist, sum hevur havt nógv lokalpolitisk álitisstørv fyri Radikala Vinstra. Hann er í løtuni næstformaður í Region Nordjylland.



# Simpsons bannað

Sjónvarpsrøðin um Simpson-familjuna er eftir øllum at døma meira, enn fólk í Venesuela tola. Har hava tey gjørt av, at Simpsons skulu takast av sjónvarpsskránni, tí røðin er óhóskandi fyri børn. Tað eru hyggjarar, sum hava kært um, at sjónvarpsrøðin stríðir ímóti lógini, og tí ber ikki longur til at síggja Homer, Bart og hini í Simpsons longur í Venesuela.

# Martin setir met

Vinnarin av donsku X-Factor kappingini Martin er rættiliga á toppinum í Danmark í løtuni. Hann hevur sett nýtt met við sanginum The 1. Sangurin er downloadaður 15.000 ferðir eftir bert einari viku, og so skjótt hevur eingin annar sangur í Danmark selt áður. Tað gongur so væl hjá Martin í løtuni, at fólk í tónleikavinnuni uttanfyri Danmark eisini eru farin at halda eyguni við honum.



# Swayze takkar fyri stuðulin

Amerikanski sjónleikari Petrick Swayze takkar nú sínum fjepparum fyri stuðulin í stríðnum ímóti krabbameini. Swayze, sum gjørdist heimskendur við filminum Dirty Dancing, hevur krabbamein í brisinum, og hann er í kemo-viðgerð í løtuni.

- Viðgerðin gongur væl, og vit kenna á okkum, at positivir tankar og bønir hjálpa okkum, siga Patrick Swayze og konan í eini fráboðan.



# Lizzie sang karaoke

Føroyska songkvinnan Lizzie hevur í fleiri ár arbeitt á Sams Bar í Keypmannahavn, og har ber til at syngja karaoke. Tað hevur Lizzie eisini gjørt. Nú er hon blivin poppstjørna í Danmark við mega-hittinum Ramt I Natten, men farna vikuskiftið bar til at hoyra hana syngja karaoke aftur. Hon treiv í mikrofonina á Sams Bar, og tað hóvaði teimum hjástøddu væl, skrivar Se&Hør. Lizzie sang tó ikki sítt stóra hitt.



Sosialurin